# Fyrilestrarrøð um lívfrøðiligt margfeldi

TÍÐINDASKRIV

ST hevur lýst 2010 at verða altjóða lívfrøðiligt margfeldisár. ST-sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldi varð undirskrivaður av einum stórum parti av heimsins londum á Rio-ráðstevnuni í 1992. Longu í juni 1993 høvdu 168 lond skrivað undir sáttmálan og nú í 2010 hava 192 lond undirskrivað sáttmálan - harímillum Føroyar.

Lívfrøðiligt margfeldi umfatar alt tað livandi fjølbroytni, ið náttúran rúmar.

Sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldi er komin, tí heimssamfelagið metir, at ein niðurgongd av lívfrøðiliga margfeldinum er ein so stórur missur fyri lívið á jørðini. Sáttmálin hevur trý høvuðsevni, hesi eru:

1. Varðveitsla av lívfrøðiliga margfeldinum
2. Burðardygg nýtsla av tí, ið lívfrøðiliga margfeldið gevur
3. Eitt rættvíst og javnt býti av ágóðum, ið stava frá nýtslu av genetiska tilfeinginum Føroya Fróðskaparfelag, Lívfrøðingafelagið og Náttúrugripasavnið hava í felag lagt til rættis eina skrá av fyrilestrarrøðum fyri 2010. Vit fara á ymsan hátt at lýsa lívfrøðiligt margfeldi eisini frá øðrum sjónarmiðum enn teimum reint lívfrøðiligu.

Fyrstu fyrilestrarnir verða 24. februar 2010 kl. 19.30 í framsýningarhølunum hjá Náttúrugripasavninum á Debesartrøð.

**Tveir fyrilestrar verða á skránni:**

Anna Maria Fosaa, lívfrøðingur, PhD:
*- Hví lívfrøðiligt margfeldisár í 2010?*

Í fyrilestrinum verður greitt frá, hvat lívfrøðiligt margfeldi er, og hví ST hevur valt 2010 til at verða lívfrøðiligt margfeldisár. Um hvønn týdning tað hevur fyri okkara lívsgrundarlag at varðveita lívfrøðiliga margfeldið. Hvat gera vit her heima, og hvat ger Náttúrugripasavnið í hesum høpi.

Firuz Gaini, fólkalívsfrøðingur, PhD:
*- Mentanarligar oyggjar alheimsins. Lívfrøðiligt margfeldi sæð úr einum mentanarfrøðiligum sjónarhorni.*


Ítróttarsosialurin
– vit eru har tað hendir




## Runavíkar kommuna undir álíkningini í skuld

Runavíkar kommuna er komin undir álíkningini í skuld eftir at hava verið oman fyri skuldarmarkið í stórt ár. Hesum boðar Fíggjarmálaráið frá. Herdu ásetingarnar í kommunustýrislógini til fíggjarligu viðurskiftini hjá serliga skuldartyngdum kommunum eru frá 1. februar tí ikki galdandi fyri Runavíkar kommunu.

## Heryvirmenn í fongsul

Í Turkalandi hevur ein dómstólur varðhaldsfongslað sjey týðandi heryvirmenn, sum samstundis eru formliga skuldsettir fyri at hava havt ætlanir um at koyra stjórnina frá. Tað var í 2003, at tað bleiv avdúkað, at partar av herinum høvdu ætlanir um eitt hernaðarkvett, og umleið 50 heryvirmenn vórðu tiknir. Nú kemur málið fyri rættin, og dómstólurin í Istanbul hevur avgjørt, at fýra ovastar í herflotanum og tríggir í herinum skulu í varðhaldið at sita. Turkiska ákæruvaldið sigur, at fleiri aðrir heryvirmenn eru til avhoyringar í hesum døgum.


HOYRDI TÚ LÝSINGINA?

**Radiolýsingar sum rigga**
**Fyrilestur við Carsten Agerbæk**
Hotel Tórshavn, hósdagin 25. feb. kl. 9-12

Innbjóðing

Vinnulívfólk, handilseigari, marknaðarfólk ella lýsingarframleiðari...



...m, ert tú handilseigari, sølu/marknaðar-
...singarframleiðari, so ert tú vælkomin ...
...ósmorgunin ímillum 9-12.

**Carsten Agerbæk** fer at greiða frá um brúk av ljóðlýsingum. Eisini verður hugnakvøld í Miðlahúsinum fríggjakvøldið við tónleiki, skemti og góðum mati.

**Tilmelding á birgir@ras2.fo**

**Tiltakið er ókeypis**

RÁS 2

Rás2 · Tórsgøta 1 · FO-100 Tórshavn · telefon 35 99 99 · ras2@ras2.fo · www.ras2.fo